**Hervið verður biðið um tilboð uppá:**

3 stk. hvítar 4x4 lastbilar við dubultkabinu

| | |
|---|---|
| Lastievni við last montera á, **minimum** | 3000 kg |
| Totalvekt | 6500 – 8500 kg |
| Longd á last | 3200 – 3300 mm |
| Aksilfrástøða | 3400 – 3600 mm |

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

| **Vekting:** | **%** |
|---|---|
| Prísur | 80 |
| Veitingartíð | 20 |
| **Samla** | **100** |

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri. Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Tilboðsgevarar kunnu seta spurningar til tilboðið til og við **týsdagin 12 juli 2016 kl 0900**

Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til jpp@lv.fo.

Spurninganir verða síðani viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi **týsdagin 12 juli 2016 kl 1600**

Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðinum ella ikki, umleið 1-2 dagar, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Tilboðini skulu verða Landsverk í hendi í seinasta lagi **hósdagin tann 21 juli 2016 kl 1200**

Tilboðið skal sendast **í PDF formati** við telduposti til lv@lv.fo & jpp@lv.fo

Stílast til

Landsverk

Att.: Jóan Petur Patursson

Tinghúsvegur 5

FO-110 Tórshavn